


Klaksvíkingar høvdu nógvar bástar á stevnuni

**Klaksvík er 99% fiskur, so skuldu vit ikki verið við á eini fiskivinnustevnu, hvar skuldu vit so verið, spyr Kristian Olsen**

FISKIVINNUSTEVNA
*Áki Bertholdsen*

# Sjálvandi eru vit við

**Sosialurin í Runavík:** Tað er sjálvsagt, at vit eru við á eini fiskivinnustevnu.

Tað heldur Kristian Olsen úr Klaksvík.

Hann er við á fiskivinnustevnuni í Runavík.

Klaksvík er 99% fiskur. Skulu vit ikki vera við á eini fiskivinnustevnu, hvagar skulu vit so fara, spyr hann. Klaksvíksbásurin umboðar bæði Klaksvíkar Býráð, Klaksvíkar Havn og Norðoya Kunningarstovuni.

– Okkara uppgáva verður at upplýsa um tað, sum klaksvíkin hevur at bjóða, sigur hann, bæði sum býur og sum fiskivinnuhavn.

Við sær hava teir faldarar og annað tilfar um Klaksvík og Norðoyggjar sum heild og teir hava eisini faldarar frá Ferðaráðnum um Føroya Lands sum heild.

Hann sigur, at tað hevur verið fult av fólki á tí almenna klaksvíksbásinum og hann er bilsin av, hvussu nógv fólk hava biðið um faldarar. Serliga eru teir slopnir av við nógvar faldarar á enskum, so hann ivast ikki í, at hetta fer art kasta okkurt av sær seinni.

Annars eru fleiri virki úr Klaksvík við á stevnuni.

# Bjóðaðir á stevnu aftur næsta ár

**Føroyskir og útlendskir framsýnarar á fiskivinnustevnuni í Runavík, eru bodnir á styevnu í Hanstholm komandi ár**

FISKIVINNUSTEVNA
*Áki Bertholdsen*

**Sosialurin í Runavík:** Tað tykist sum um stórur áhugi er fyri at halda fiskiinnustevnu.

Tá ið framsýnararnir á stevnuni í Runavík komu til arbeiðis í gjáramorgunin, lá litfagur faldari á hvørjum borði við eini innbjóðing um at koma á fiskivinnustevnu í Hanstholm næsta ár.

Stevnan í Hanstholm nevnist "Havfisk International" og er í døgunum 16.-18. september komandi ár.

Hanstholm er størsta fiskivinnuhavn í Danmark og hetta er aðru ferð, at stevnan verður hildin har.

Á seinastu stevnuni í Hanstholm vóru nakrir gestir úr Føroyum á stevnuni, men ongin fyritøka var og sýndi fram.

– Tað vóna vit verður øðrvísi næsta ár, siga fyrireikararnir av stevnuni í Runavík.

Teir siga, at á stevnuni er mest hugsað um norðuratlantshav, tvs Danmark, Noregi, Føroyar og Ísland.

Seinast, stevnan var, voru útvið 5.000 fólk á stevnuni og hugdu og tá voru 104 básar.

Næsta stevnan verður munandi størri. Tá verður stevnan einar 7.000 fermetrar, tvs, at hon verður nakað størri enn stevnan, sum nú er í Runavík.

Tey, sum vilja vita meiri um stevnuna í Danmark, kunnu fara á alnetið: www.havfisk.dk




Í Hanstholm bjóða teir nú øllum framsýnarunum á fiskivinnustevnuni aftur á stevnu í Hanstholm næsta ár



# Enn er ov tíðliga at siga um fiskidagarnir lække

**Skulu fiskidagarnir lække komandi ár, verður tað ikki við teimum grundgevingum, sum Henrik Old førir fram, sigur Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum**

FISKIVINNA
*Áki Bertholdsen*

**Sosialurin í Runavík:** Enn er ov tíðliga at siga , um tað verður neyðugt at lække fiskidagarnar næsta fiskiár.

Tað sigur Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum.

Vit fingu eitt stutt prát við hann á fiskivinnustevnuni í Runavík seinnapartin týsdagin, har hann var komin at hyggja.

Hann er ikki samdur við Henrik Old, formann í vinnunevndini, sum í fiskivinnublaðnum hjá Sosialinum í farnu viku, í sambandi við stevnuna í Runavík, segði, at tað verður neyðugt at lække fiskidagatalið komandi ár.



Jacob Vestergaard , landsstýrismaður í fiskivinnumálum, var millum gestirar á fiskivinnustevnuni í Runavík. Hann sigur, at enn kann ongin siga, hvussu verður við fiskidagatalinum komandi ár

Hetta bygdi hann á tær samanleggingar, sum hava verið og sum hava økt munandi um veiðitrýsti eftir hansara tykki.

– Verður tað neyðugt at lække fiskidagatalið, verður tað í hvussu so er ikki við teimum grundgevingum, sum Henrik Old førir fram, sigur Jacob Vestergaard.

Hann er nevniliga ikki samdur í, at tær samanleggingar, sum eru gjørdar, hava økt um veiðitrýstið, soleiðis sum formaðurin í vinnunevndini hevur ført fram.

Fiskidaganevndin skal koma við einum tilmæli um fiskidagarnar. Fyrrenn tað tilmælið kemur, er ómøguligt at siga nakað um fiskidagarnar. Samstundis verður tilmælið frá fiskidaganevndini rættiliga avgerandi fyri, hvussu verður við fiskidagatalinum, sigur JacobVestergaard á fiskivinnuráðstevnuni í Runavík.

### At fara nakað langt

Henrik Old meinti júst, at tað var rætt at seta eina nevnd at gera myndugleikunum tilmæli um fiskidagar og um, hvussu samanleggingar kunnnu leggjast saman o.s.fr.

Men tað er Jacob Vestergaard heldur ikki samdur í.

– Tað eru greiðar mannagongdir fyri, hvussu loyvi kunnu leggjast saman, tí tað er ásett í kunngerð, so tað er í fastari legu.

– Og eftir kunngerðunum, sum eru gjørdar, er tað rættiliga einfalt at rokna veiðitrýstið út.

Annars er fiskidaganevndin ein faklig nevnd, so hon gevur tilmæli um fiskidagar. Harafturat hava vit eitt fiskivinnuráð, sum er samansett av fólki í vinnuni, sum eisini gevur landsstýrismanninum tilmæli.

At gera eina nýggja nevnd, sum skal arbeiða inni í sjálvum Fiskimálaráðnum, er óneyðugt, sigur Jacob Vestergaard. At fiskimálaráðið ikki longur skal kunna viðgerða einstøk mál, er at fara í so langt, heldur Jacob Vestergaard.

Hann er heldur ikki samdur við Henrik Old í, at fiskidagfaskipanin er farin av sporinum, at hansara fremsta endamál verður at endurreisa álitið á hana aftur.

- Eg haldi ikki, at fiskidagaskipanin er farin av sporinum. Vit hava kjakast um einstøk mál. Møguliga skal lítið til, men eg haldi ikki at hesi málini geva orsøk til at halda, at skipanin er við at fara av sporinum, sigur Jacob Vestergaard.

Men hann leggur afturat, at sjálvsagt eiga vit at fylgja við, hvussu gongdin í veiðitrýtinum er, leggur landsstýrismaðurin afturat.




Stórur áhugi var fyri básinum hjá Sosialinum



Frá framsýningini í Runavík